# Tórbjørn farin í rækju-vinnuna


*Ocean Castle endar nú á Glyvrum*

**Kongshavnar Útgerðarfelag hevur keypt partapeningin aftanfyri rækjutrol-aran Ocean Castle, og Tórbjørn og teir rokna við, at tað fer at bera til**

Mánadagin í síðstu viku varð handilin avgreiddur, og á eykaaðalfundi fyrrapartin í gjár vórðu nevnd og stjórn í felagnum skift út. Tað er Kongshavnar Útgerðarfelag, sum feðgarnir Jóan Jakku og Tórbjørn Jacobsen á Glyvrum eiga, sum hevur keypt partabrøvini í partafelagnum Borgarfelli og smápartafelagnum Slættafelli á Skála. Hesi feløgini hava átt rækjutrolaran Ocean Castle. Trolarin eigur kvotu í Eysturgrønlandi upp á 115 tons, umframt part í samlaðu dagakvotuni á Flemish Cap og eystanfyri. Í nevndini eru nú Jóan Jakku Jacobsen, Tórbjørn Jacobsen og Bjørn á Heygum. Stjóri í felagnum er Tórbjørn Jacobsen.

Sum hjá øllum øðrum rækjuskipum hevur raksturin verið tungur hjá Ocean Castle. Rækjuprísirnir eru í botni, og oljan hevur verið so dýr sum ongantíð áður.

Er tað ikki burturvið at seta pening í eina vinnu, sum so at siga hýkur á knøunum, hava vit spurt Tórbjørn Jacobsen:

– Í løtuni ber ikki til at fáa raksturin at bera seg. Men tað verður hildið, at tað skulu ikki so stórar broytingar til, áðrenn tað kann hanga saman. Felagið, sum átti skipið, vildi selja, og vit hava gingið út frá orðatakinum, at tað er í vánaligum tíðum, at íløgurnar skulu gerast. Samlaði partapeningurin er 6,77 milliónir krónur, og gomlu eigararnir eru ikki komnir illa burturúr handlinum, sigur Tórbjørn Jacobsen, sum ikki vil siga meiri neyvt, hvat keypsprísurin hevu verið.

Men eru tit betri skikkaðir at reka rækjuskip, enn teir eru, sum higartil hava átt felagið?

– Tað eru vit neyvan. Fá føroysk fiskiskip hava verið so nógvar dagar í sjónum sum hesin togarin. Tí hava vit heitt á manningina, sum hevur verið við, um at halda fram. Men vit hava møguleikar at fíggja ábøturnar, sum skulu til, eisini fyri at fáa betri prís pr. kilo. Verksmiðjan skal hava eina nýggja løggilding við ársenda, og eftir ábøturnar, ið gjørdar verða í hesum sambandi, skuldi tað verið møguligt at fingið meiri burturúr tilfeinginum. Hetta var ikki møguligt hjá teimum, sum frammanundan áttu skipið, tí raksturin leingi hevði verið tungur.

### Góðar og minni góðar síður

Kapitaltrotið í rækjuvinnuni kemst m. a. av løgtingslógini um "sanering" av stuðulslánum til rækjuflotan. Løgtingslógin er frá 1998, og málið við lánunum, sum eru rentu– og avdráttarfrí inntil 2012, var, at flotin skuldi varðveitast á føroyskum hondum. Tá tey tólv árini eru farin, detta lánini burtur. Um skipini verða seld innan tíðarkarmin, so fellur alt stuðuslánið til gjaldingar. Í hesum førinum er talan um 42 milliónir krónur.

– Málið við lóggávuni var og er gott. Annaars hevði meginparturin av fjarfiskiflotanum farið av landinum – ígjøgnum konkursir – har í hitt almenna hevði mist peningin kortini. Hetta eru tey seinastu stuðulslánini, sum eru eftir, so eingin vandi er heldur fyri, at hendan lógin verður ein fyrimynd fyri aðrar partar av flotanum í vanligum tíðum. Soleiðis sum tað skjótt kundi blivið við einari veikari politiskari skipan. So mikið hava vit sæð áður. Skuggasíðan er, at tað ikki ber til hjá rækjuflotanum at læna til ábøtur og rakstur. Eingin fíggingarstovnur fer at læna við panti uttanfyri almenna veðhaldið. Alt hetta er orsøkin til, at teir, sum áttu partafeløgini, vildu selja, og at vit keyptu. Og eg kann leggja afturat, at vit eru serliga fegnir um, at tað eydnaðist okkum at keypa, tá tað helst er ein veruleiki, at vit kappaðust við útlendingar, sum umvegis føroyskar stráðmenn ætlaðu sær partafelagið og harvið skipið og kvoturnar, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Ætlanin hjá Kongshavnar Útgerðarfelag er at fusionera partafeløgini. Tað verður beinanvegin farið undir at gera neyðugu ábøturnar, sum tað verður roknað við fara at kosta 3–4 milliónir krónur. Í 1989 var byggikostnaðurin fyri Ocean Castle 96 milliónir krónur. Lánibyrðan, sum skipið skal forrenta – umframt almenna pantið – er umleið 26 milliónir krónur. Størri parturin av lánibyrðini er fíggjað í Realinum og í einum japanskum banka. Kongshavnar Útgerðarfelag fíggjar sjálvt ein stóran part av íløguni og allan raksturin. Bankasambandið hjá felagnum er Føroya Sparikassi.

**jh**

# Fyrispurningur um Varda Verkstaðin á Bakka



SPARING

*Ingrid Bjarnastein*

Fyrispurningur er nú settur Sámal Peturi í Grund viðvíkjandi koyringini til og frá Varda Verkstaðnum á Bakka í Vági.

Sosialurin skrivaði mikudagin, at vegna sparingar verður busskoyringin fyri brekað í Suðuroy skerd burtur.

Tingmenninir, Jóannes Eidesgaard og Henrik Old, hava tí sett Sámal Peturi í Grund fyrispurning um, hvørjar ætlanir landstýrismaðurin nú hevur, tá busskoyringin hjá Verkstaðnum á Bakka er hildin uppat 1. oktober.

Talan er um 100.000 krónur um árið, ið skulu sparast. Peningurin strekkir ikki til, og avleiðingin av hesum er tískil, at busskoyringin fyri brekað verður niðurleggjast.

Hetta kemur sera illa við hjá varda verkstaðnum, og væntað verður, at virksemið har kemur at minka ein triðing. Minst fimm av teimum, ið dagliga eru á verkstaðnum, fáa ikki komið til arbeiðis, tí tey hava brúk fyri serflutningi, og Bygdaleiðir er ikki ført fyri at veita hesa tænastu.

Fyrispurningurin, ið Jóannes Eidesgaard og Henrik Old hava sett Sámal Peturi í Grund verður tikin upp á dagsskránni hjá løgtinginum í morgin 3. oktober klokkan 13.30.



# Farmasiglingin hjá smáu feløgunum er mest sum deyðadømd

**Ánararnir av Halgafelli, sum Sjóvinnubankin í 1992 misti 21 milliónir uppá, hava fyribils slept siglingini í Grønlandi og hava gjørt íløgur á fleiri øðrum økjum, har teir rokna við, at talan er um burðardyggar ætlanir**


*Nú er Tórbjørn Jacobsen aftur reiðari*

At feðgarnir Jóan Jakku og Tórbjørn Jacobsen á Glyvrum hava gjørt av at keypa ein rækjutrolara hevur við sær, at teir – fyribils í hvussu so er – sleppa farmavinnuni, sum teir hava verið uppií í meiri enn eina hálva øld. Jóan Jakku, sum í ungdómsdøgunum sigldi við Jóannesi Paturssyni og Kalsevni við Hvannasundsbrøðrunum Hans Paula og Andreasi Johannesen, fór eftir lokið skipsføraraprógv í 1956 út at sigla sum stýrimaður og skipari við m. a. Lauritzen, áðrenn hann og seinni sonurin fóru undir sigling á egnum kjøli – fyri tað mesta í Grønlandi.

– Fyri fýra mánaðum síðani vóru vit í Noregi. Ørindini vóru at keypa eitt farmaskip. Sáttmálin var klárur, og tað var bara eftir at skriva undir. Eg skilji væl, at tann, sum hevði ábyrgdina av handlinum, helt okkum vera óðar í høvdinum, tá vit bakkaðu út. Hann mundi nú vera mest eymur um sína egnu provisión. Vit hildu ikki, at tað var ráðiligt at halda fram í farmavinnuni, og tað hava vit ikki angrað. Fyri at siga tað stutt, so eru umstøðurnar hjá smáu feløgunum sera torførar. Stóru feløgini dumpa prísirnar, og fleiri av feløgunum, sum eru av somu stødd, sum okkara er, eru givin ella eru farin á húsagang, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Men tit hava havt eina góða rutu í Grønlandi?

– Tað er rætt, men tað hevur verið ein sera krevjandi sigling. Tað er vandamikið 24 tímar um samdøgrið og hvønn dag. Tú skalt vera uppi í sjálvur ta mesta av tíðini, og tað er avmarkað, hvussu leingi tú megnar tað. Tá so verður lagt afturat, at sáttmálarnir í Grønlandi bara fevna um eitt ár, so er grundarlagið alt ov tepurt at keypa nýtt farmaskip.

Gevst tú at sigla nú?

– Vit hava so at siga bara fingist við farmasigling nógvu tey seinnu árini. Um vit duga nakað, so er tað at vera umborð á farmaskipum. Eg havi ongar royndir at sigla við rækjutrolara, so har fara vit at lata aðrar hava ábyrgdina, sigur Tórbjørn Jacobsen, sum síðst í sjeyti árunum royndi seg umborð á Sjúrðarbergi, har Bjørn Justinussen, sáli, av Glyvrum var skipari.

### Upp og niður

Tað hevur verið nógv at hoyrt um Kongshavnar Útgerðarfelag – eisini eftir at Halgafelli fór á land í Noregi og gjørdist vrak.

Tá Tórbjørn Jacobsen lítur aftur á seinastu tíggju árini, so kann ikki sigast annað, enn at tað hevur verið buldraligt – bæði so og so.

– Í 1992 fóru vit á húsagang. Sjóvinnubankin misti – sum tann einasti kreditorurin – 21 milliónir, og tá dugdu vit ikki at skilja, hví vit skuldu fara á heysin, tí vit ikki megnaðu ein hálvan avdrátt í Skipskreditgrunninum. Undir vanligum umstøðum hevði bankasambandið lagt pengingin út. Útlitini vóru rímulig, men har bar bara einki til. Sjálvir áttu vit ongar pengar eftir. Alt var farið í vinnuna. Tað er ikki ov nógv sagt, at vit stóðu púra á berum. Men eftir 6. oktober 1992 skiltu vit alt betur. Søgan aftanfyri húsagangin var tann, at vit í 1988 keyptu Helenu, ið var eitt tvey ára gamalt farmaskip, á tvingsilssølu. Vit góvu skipinum navnið Halgafelli. Vit høvdu ikki roknað við, at tað fór at verða neyðugt at brúka átta milliónir fyri at fáa skipið siglingarklárt. Tí varð raksturin tungur. Vit kláraðu renturnar, men hesa einu ferðina megnaðu vit bara helmingin av avdráttinum, og so fall hamarin, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Tá hann greiðir frá, hvussu tað síðani gekst teimum, er frágreiðingin ikki so ólík gongdini hjá fleiri øðrum fyritøkum fyrrapartin av níti árunum:

– Skipskreditgrunnurin kravdi húsagangin á vári. Vit høvdu brúkt Sjóvinnubankan, og nú samráddust vit í fýra mánaðir við Føroya Banka um eina loysn, so vit kundu halda fram at sigla í Grønlandi, og teir tóktust vera sinnaðir at vera við. Báturin skuldi seljast 18. juni. Vit høvdu einki svar fingið frá bankanum, men kortini var eg á veg av landinum við tí í hyggju at bjóða upp á skipið. Hetta var 17. juni, og klokkan 15.45, meðan eg var á flogvøllinum, kom svarið frá bankanum, og tað var nei. Vit royndu beinanvegin at koma í samband við Føroya Sparikassa, sum akkurát tá var komin undir bankalógina. Tað eydnaðist, og klokkan 23.30 hetta kvøldið fingu vit játtandi svar. Stjórin, Eyðun á Rógvu, var staddur uttanlands, men hann bar skjótt at, og hevði tíbetur eina øðrvísi áskoðan, enn bankin hevði, og tað eigur hann alt rós uppiborið fyri. Hansara avgerð botnaði bara í treytaleysum áliti. Og tað haldi eg ikki, at vit hava svikið. So vit kunnu í dag siga, at tað er fyri ein part Eyðuni fyri at takka, at hesin rækjutrolarin nú er komin yvir um fjørðin. Tá Halgafelli fór á land í Noregi og gjørdist vrak, var báturin útgoldin, veit Tórbjørn Jacobsen at siga.

### Á fleiri frontum

Síðani Kongshavnar Útgerðarfelag gjørdi av ikki at halda fram í farmasiglingini, hava teir gjørt íløgur á fleiri øðrum økjum. Eitt nú eiga teir handilsbygningin, har Bónus á Glyvrum heldur til, teir hava sett eina millión í partafelagið Atlants Kolvetni, teir eiga ein part av partapeninginum í Stranda Máling, og so eru teir eisini uppi í Havsbrún í Fuglafirði.

– Prinsipielt halda vit, at tað skal vera vónin um, at tað fer at bera til, sum skal vera orsøkin til allar vinnuligar íløgur. Fyri okkum hevði tað ivaleyst verið lagaligari at rikið virkið, sum vit hava á havnaøkinum í Runavík og so at havt pengarnar fyri Halgafelli í bankanum. Skyldmaðurin Hans Pauli Johannesen skuldi eina ferð siga, at peningur í rúgvu ger ongan mun. Hann skal brúkast sum tøð, so tað fæst at grógva nógva staðni, og tað taki eg undir við honum í.

Umframt at hava yvirtikið Ocean Castle, hevur Kongshavnar Útgerðarfelag fyrr í ár sett fimm milliónir í Dagsbrún í Fuglafirði. Talan er um holdingfelagið, sum eigur ein stóran part av partapeninginum í Føroya Fiskiídnaði, sum aftur eigur Havsbrún.

– Tað vóru fleiri onnur feløg, sum settu pengar í Havsbrún, Eg eri heilt vísur í, at tann íløgan er burðardygg. Men tað er einki at liggja oman á, at talan eisini var um eina so at siga neyðloysn. Útlendskur kapitalur var framvið. Høvdu føroyskar fyritøkur ikki tikið seg saman, so hevði Havsbrún og harvið stórur partur av føroysku alivinnuni verið á útlendskum hondum, og tað hevði verið ein skandala!

**jh**


